**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 106/2018: Uppskot til samtyktar um at seta í gildi fyri Føroyar fríhandilssáttmála millum Føroyar og Sameinda Kongsríkið Stórabretlands og Norðurírlands**

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, Poul Michelsen hevur lagt málið fram 28. februar 2019, og eftir 1. viðgerð 8. mars 2019 er tað beint Uttanlandsnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 21. og 28. mars 2019.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Vinnuhúsið og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum, Poul Michelsen.

Uttanlandsnevndin tekur undir við uppskotinum um undirritan av fríhandilssáttmála, eftir sonevnda *roll-over* leistinum, sum skal vera galdandi fyri viðurskiftini millum londini, tá Stórabretland fer úr ES.
Um/tá Stórabretland fer úr ES, er tað týdningarmikið, at Føroyar fara at samráðast um ein nýggjan og betri fríhandilssáttmála við Stórabretland.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Uttanlandsnevndin, 28. mars 2019**

| | | |
|---|---|---|
| Annita á Fríðriksmørk<br>formaður | Kaj Leo Holm Johannesen<br>næstformaður | Jákup Mikkelsen |
| Bjørt Samuelsen | Magni Laksáfoss | Henrik Old |

Kári P. Højgaard